# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Jórun Smith 70 ár



Í dag, hósdagin 2. juli, fyllir Jórun Smith á Argjum 70 ár.

Jórun er ættað úr Syðrugøtu, dóttir Honnu, f, Gregersen, úr Syðrugøtu, og Leon Joensen í Froðba.

Hon er elst av fimm systkjum, hini eru: Líggjas og Oddvá, sum búgva í Havn, Jógvan Salomon, sum býr í Gøtu, og Helgi, sum býr í London.

Sum ung fór Jórun til Danmarkar á húsarhaldsskúla í Sorø. Seinni fór hon í læru sum læknaskrivari á Landssjúkrahúsinum, og hetta bleiv hennara lívsstarv.

Jórun giftist John Smith úr Vági. John arbeiddi á teknistovuni á Tórshavnar Skipasmiðju, áðrenn hann var settur sum stóri á Vestmanna Skipasmiðju, har hann t.d. stóð fyri byggingini av fleiri framkomnum fiskiskipum. John andaðist í 1999, 64 ára gamal.

Jórun er ein virkin pensionistur. Hon kemur nógv í Tilhaldið í Tórsgøtu og ferðast ofta saman við øðrum pensionistum.

Jórun og John fingu trý børn: Leon, sum býr í Havn, og tvíburarnar William og Mariu, sum búgva ávikavist í Sørvági og í Havn. Ommubørnini eru 9 í tali.

Føðingardagurin verður hildin saman við innbodnum.

*-red*

## Sofía Jacobsen 85 ár



6. juli fyllir omma og langommu okkara 85 ár.

Í hesum sambandi vilja ommu- og langommubørn tíni nýta høvið at takka fyri alt tú er og hevur verið fyri okkum. Altíð hevur tú verið festlig og jalig. Vit vilja takka fyri nógvar góðar løtur; útferðir, fiskitúrar við báti og við tráðu, døgverða- og náttverðabitar og nógvar góðar og gevandi løtur í Frelsunarherinum, og fyri okkara frístað á Grønlandsv. 19.

Føðingardagur verður hildin í Frelsunarherinum, Tórsgøtu 19, sunnudagin 5. juli millum kl.12-18

Vit ynskja tær eitt gott føðingardagshald, og Harrans signing yvir framtíð tíni.

Enn einaferð - takk fyri alt »Laksadrotning« :o) og heimsins besta omma og langomma.

Vit elska teg!

## Málningaframsýning í Smiðjuni

Fríggjadagin 3. juli kl. 14 letur Hilmar J. Højgaard í Saltnesi upp málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Við á framsýningini eru umleið 30 nýggir akryl málningar.

Framsýningin verður opin til og við týsdagin 7. juli, allar dagar frá kl. 14 til 19.



*Hilmar J. Højgaard hevur framsýning í Smiðjuni í Lítluvík frá 3. til 7. juli*

†

## Andlát og jarðarferðir

**André Isholm Andrésen** andaðist mánakvøldið 29. juni á Landssjúkrahúsinum, 41 ára gamal.

**Niels Jacob Madsen, Sandur**, andaðist á Áargarði 30. juni, 88 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Osvald Hansen, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 24. juni, 87 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Osvald, kunnu lata Nýrafelagnum eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Dagurin**

**2. juli. Syftunsøka.** Hildin til minnis um enska biskupin í Winchester Swinthun, sum doyði ár 862. Tann 15. juli ár 971 varð hann skírdur halgimenni. Minningardagur hansara er í Onglandi 15. juli, men í Føroyum og Norra er hann tann 2. juli, sum var deyðadagur hansara. Tað er tí helst úr Norra, at syftunsøkudagur er komin higar. 2. juli er eisini ein gomul mariumessa, vitjunardagur Mariu, til minnis um at Maria Moy vitjaði skyldkonu sína Elisabeth, móðir Doyparans. Niels Winther var føddur hendan dagin í 1822.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

